# Stuðulspolitikkur

**Kapittul 1**
**Endamál**

**§1.** Stuðulspolitikkurin er eitt amboð til viðgerð av stuðulsumsóknum til Eiðis kommunu og sum reglugerð hjá umsitingini at avgreiða stuðulsumsóknir:

1. Endamálið við stuðulspolitikkinum er:
2. at lýsa hvønn stuðul kann verða latin til;
3. at greiða frá, hvussu stuðla verður;
4. at greiða frá, hvør tekur avgerð um stuðul.

**Kapittul 2**
**Hvønn stuðul kann verða latin til**

**§2.** Stuðul kann verða latin til niðanfyri standandi virksemi hjá borgarum ella felagsskapum búsitandi ella sum hava sítt virksemi í kommununi:

1. Ítrótt
2. sang og tónleik
3. sjónleik í breiðari merking
4. myndlist, írokna heimavirki og gomul handverk
5. áhugafeløg og frítíðarvirksemi
6. bóka-,blað og tónleikaútgávur
7. námsferðir og seturskúlar
8. bygdasøvn/fornminnisfeløg.

**§3.** Verður skipað fyri alment gagnligum tiltøkum, kappingum, ítróttar-, summar-, ella líknandi stevnum í kommununi, kann eyka stuðul, umframt stuðul sambært kap. 3 og kap. 4, verða latin. Málið skal tá viðgerast í Trivnaðarnevndini, Fíggjarnevndini og í Bygdaráðnum.

**§4.** So leingi játtan er tøk, kann stuðul verða latin eftir hesum stuðulspolitikki.

**Kapittul 3**
**Stuðul til ítróttar-frítíðar- og áhugafeløg.**

**§5.** Ítróttar-frítíðar og áhugafeløg í Eiðis kommunu kunnu søkja um árligan stuðul.

**§6.** Umsóknin skal viðgerast av Trivnaðarnevndini fyrstu ferð søkt verður. Um umsøkjari ikki hevur søkt um stuðul í trý fylgjandi ár skal komandi umsókn viðgerast av nýggjum í Trivnaðarnevndini.

**§7.** Stuðulin verður ásettur árliga í sambandi við fíggjarætlanina hjá Eiðis kommunu.

**§8.** Til tess at verða heimilað stuðli, skal umsøkjarin lúka hesar treytir:

1. Skal verða heimahoyrandi í kommununi
2. Skal hava limalista og krevja inn limagjald.
3.Kommunan kann krevja at fáa avrit av gerðabókini frá aðalfundinum. Gerðabókin skal prógva, at roknskapur er lagdur fram á fundinum og góðkendur. Harafturat skal kommunan kunna biðja um avrit av roknskapinum, um ivamál stinga seg upp um eitthvørt.
4. Kommunan kann krevja at fáa váttan fyri tal av limum og hvussu nógv limagjald er goldið.

**§9.** Stuðulin kann hækkast til feløg, sum Hava miðvíst ungdómsarbeiði, tað vil siga regluligt og skipað tilboð til børn og ung, við vegleiðing og upplæring frá venjara/leiðara.

**§10** Ítróttarfeløg skulu sum meginregla luttaka í landskappingum, um slíkar verða hildnar.

**§11.** Kappróðrafeløg kunnu søkja um eyka stuðul til nýbygging av kappróðrarbátum. Málið skal tá viðgerast í Trivnaðarnevndini, Fíggjarnevndini og í Bygdaráðnum.

**Kapittul 4**
**Stuðul til mentanarlig endamál.**

**§12**. Sangarar, tónleikarar, listafólk og onnur, ið eru heimahoyrandi í Eiðis kommunu, kunnu søkja um stuðul til framførslur, verkætlanir, vitjanir, skeiðvirksemi og líknandi, sum verður hildið í ella uttan fyri Eiðis kommunu.

**§13**. Sangarar, tónleikarar, listafólk og onnur heimahoyrandi uttan fyri Eiðis kommunu, kunnu søkja um stuðul til verkætlanir, vitjanir, skeiðvirksemi og líknandi, tá hetta verður hildið í Eiðis kommunu.

**§14**. Kommunan kann stuðla við peningaupphædd upp til kr. 5.000 til mentanarlig endamál um mett verður at hetta er gagnligt og/ella áhugavert fyri Eiðis kommunu.

**§15**. Stuðulin verður útgoldin sambært treytum, sum umsitingin ásetur.

**Kapittul 5**
**Onnur Feløg**

**§16**. Felagsskapir, sum eru á fíggjarlóg landsins, fáa ikki stuðul frá Eiðis kommuna.

**§17**. Landsdekkandi felagsskapir fáa ikki stuðul frá Eiðis kommunu.

**Kapittul 6**
**Stuðul til námsferð og seturskúlar.**

**§18**. Eiðis skúli og Skúlin við Streymin kunnu søkja um stuðul til námsferð ella seturskúla fyri næmingar einaferð í 7. flokk og einaferð frá 8.-10. flokk.

**§19**. Stuðulin til skúlarnar verður einans veittur til teir næmingar, sum hava búðstað í Eiðis kommunu.

**§20**. Fyri at fáa stuðulin skulu næmingarnir sum meginregla arbeiða ein dag fyri kommununa. Stuðulin frá kommununi er kr. 1.000 fyri hvønn næming. Peningurin verður útgoldin, tá arbeiðið er gjørt.

**Kapittul 7**
**Umsóknir og freistir**

**§21**. Allar umsóknir um stuðul skulu latast kommununi skrivliga.

**§22**. Umsóknir sambært kapittul 3 skulu verða kommununi í hendi innan 1. mai. Stuðulin verður útgoldin eftir at umsóknarfreistin er farin.

**§23**. Umsóknir um stuðul til nýbygging av kappróðrarbátum sambært § 11, skulu verða kommununi í hendi innan 1. september, soleiðis at hetta kann verða viðgjørt ísv. fíggjarætlan fyri komandi ár.

**§24**. Umsóknir um stuðul til mentanarlig endamál, sambært kapittul 4. skulu verða kommununi í hendi í góðari tíð, innan peningurin skal nýtast. Umsóknirnar verða viðgjørdar leypandi.

**§25**. Umsóknin til námsferð og seturskúlar sambært kapittul 6, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi ein mánað, áðrenn námsferðin byrjar.

**Kapittul 8**
**Heimild**

**§26**. Umsitingin er heimilað, at avgreiða stuðulsumsóknir eftir hesum stuðulspolitikki.

Stuðulspolitikkurin hjá Eiðis kommunu samtyktur av bygdaráðnum **31.05.2023**

Annsy Høghamar, borgarstjóri.

EIÐIS KOMMUNA